# Jákup helt tætt

**Næstbesta liðið hjá Molde vann mánakvøldið fyrsta dystin í hesum kappingarárinum**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað kennist neyvan serliga avbjóðandi hjá einum landsliðsmálverja, sum hevur staðið andlit til andlit við nógvar av teimum bestu spælarunum í Europa, og sum hevur smakkað rákan av at vinna danska meistaraskapin í fótbólti.

Lítla avbjóðingin, sum tað verður sipað til omanfyri, er tann, sum vit kunnu ímynda okkum, at tað er hjá Jákupi Mikkelsen at verja málið á næstbesta liðnum hjá Molde. Men Jákup hevur ein sera professionellan hugburð til fótbóltin, og sjálvandi gjørdi hann sítt besta. Tað er í málinum á næstbesta liðnum og undir venjing, at hann skal sannføra um, at hann eigur at vinna plássið í málinum á besta liðnum. Tann sessin hevði Eddie Gustafsson sunnudagin.

Næstbesta liðið hjá Molde spælir í 2. deild, sum er triði besta deildin í Noregi. Mánakvøldið spældu teir á heimavølli ímóti Larvik. Molde vann 1–0. Málið fingu teir í 69. minutti. Dysturin varð spældur á graslíkisvølli í Molde.

# AGF nærri niðurflyting

**Vejle er ikki verri fyri í botnstríðnum, enn teir vóru undan dystinum hjá AGF mánakvøldið**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Vejle og Christian Høgni Jacobsen stríðast fyri at varðveita sessin í superliguni. Teir eru í niðurflytingarvanda. Tí sigur tað seg sjálvt, at teir í Vejle fylgdu væl við, tá AGF mánakvøldið var í Gladsaxe og spældi ímóti AB. Akademikara liðið minnast teir í Vejle væl til. Næstsíðsta sunnudag vann AB 4–0 ímóti Vejle, men eitt mistak í roknskapinum við útlendskum spælarum hevði við sær, at tað var Vejle, sum á skrivaraborðinum vann 3–0. Harvið løgdu Christian Høgni og teir eitt kanska alt avgerandi glopp millum seg og niðurflytingarstrikuna.

AGF fekk einki burturúr ferðini til Keypmannahavnar. AB vann 1–0. Málið fingu teir í 64. minutti. Mohamed Nabate royndi seg, AGF málverjin hálvbjargaði, og tá myrki álopsmaðurin royndi fyri aðru ferð, var AGF málverjin so óheppin, at hann stýrdi bóltinum í málið.

Tað var nógv ferð á, men spælið var einki at rópa hurrá fyri. AGF var heilt væl við, og teir høvdu møguleikar, sum kundu givið mál. Men tað gongst sera illa hjá teimum at skora. Í hesum kappingarárinum eru teir tíggju ferðir farnir av útivøllinum, uttan at tað hevur eydnast at fáa mál.

AB spælararnir eru nú farnir seks ferðir av vøllinum á rað uttan at hava tapt. Tá gamli liðfelagin hjá Toda Jónsson, Heine Fernandez, sum nú spælir í AB, eftir dystin varð spurdur, um hann helt, at AGF ella Vejle fór at flyta niður, svaraði hann, at hann helt, at AGF hevði eitt betri lið.

# Hjalgrím og Aston Villa skiljast

**Stórfelagið í Birmingham leitar eftir einum boksspælara, og tað halda teir ikki, at Hjalgrím er, men teir siga halda unga KÍ spælaran vera væl fyri**



ÚTFERÐARLONGSUL
*Jóannes Hansen*

Eftir at hann hevur verið eina viku í Birmingham, er Hjalgrím Elttør aftur í Klaksvík. Tað verður eingin sáttmáli skrivaður millum hann og Aston Villa. Við KÍ heimasíðuna sigur Hjalgrím Elttør, at hann iðrar seg ikki so nógv um, at einki spurdist burturúr ferðini til Onglands. Hann sigur seg harmast nógv meiri, at KÍ ikki verður við, tá fjórðingsfinalurnar í steypakappingini verða spældar fríggjadagin.

Umframt Hjalgrím Elttør hevur Aston Villa havt vitjan av fleiri ungum spælarum, sum hava tað til felags, at teir droyma um at gerast fulltíðar yrkisspælarar í onkrum av europeisku stórfeløgunum.

Eftir eina viku við venjing og fleiri dystum fekk Hjalgrím Elttør at vita, at felagið hevði tikið avgerð um, at tað verður ikki hann, sum teir í hesum umfarinum fara at skriva sáttmála við.

– Teir søgdu seg leita eftir einum typiskum boksspælara, og tað eri eg ikki, sigur Hjalgrím Elttør. Fótbóltshugaðir føroyingar vita, at Hjalgrím Elttør er ikki tað slagið av fótbóltsspælara, sum støðugt lúrir í brotsteiginum eftir einum leysum møguleika. Hann er sera arbeiðssamur, rennur nógv og trívst best, tá hann hevur bóltin nógv og sleppur at vera partur í samanspælinum fram eftir vøllinum.

Sambært KÍ heimasíðuni søgdu teir í Aston Villa seg duga at síggja nógvar dygdir í fótbóltsspælinum hjá Hjalgrími Elttør, men hetta vóru altso ikki akkurát tær dygdirnar, sum teir hildu seg hava brúk fyri.

Hjalgrím sjálvur sigur seg ikki vera vónbrotnan av ferðini. Hann sigur seg hava havt ein fínan túr, og hann heldur seg hava fingið royndir, sum verða kærkomnar, tá tað møguliga verða boð eftir honum eina aðra ferð.

Í fyrstu atløgu snýr tað seg nú um hjá Hjalgrími og KÍ at savna allar hugsanirnar um fyrireikingarnar til fyrsta landskappingardystin. Hann verður á heimavølli ímóti Skála annan sunnudag.

Liðini í steypakappingini hava annars møguleikar at fáa góða dystarvenjing. Umframt fjórðingsfinalurnar, sum verða spældar fríggjadagin, eru innan farið verður undir landskappingina, fyrru hálvfinalurnar á skránni. Tær verða spældar nú sunnudagin.

# Kappingarskipanin útkomin

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Nú er kappingarskipanin hjá Fótbóltssambandi Føroya endiliga útkomin. Skipanin hevur eitt fullfíggjað yvirlit yvir allar dystir, sum FSF skipar fyri í 2002.

Í fororðinum skrivar FSF, at fótbólturin er í støðugari menning, og at alt fleiri lið eru við á hvørjum ári í øllum aldursbólkum. Hetta setir krøv til FSF og tey einstøku feløgini. Fótbóltssambandi skipar fyri bæði venjara- og dómaraskeiðum kring landið, og tey hava verið væl vitjað.

Seinasta kappingarár fór verkætlanin Yngst av bakkastokki, og hon heldur fram í ár. Í ár verður skipað fyri fimm Yngst-stevnum. Tríggjar vera áðrenn summarsteðgin og tvær aftaná.

Nakrar broytingar eru framdar. Kappingin hjá unglingum er í ár skipað soleiðis, at spælt verður fyrst í tveimum bólkum, har tvey tey fremstu fara víðari í finalubólkin. Restin spælir síðani eina steypakapping.

Steypakappingarnar hjá teimum yngru deildunum verða avgreiddar yvir tvey vikuskifti, eins og tað varð gjørt hjá smádreingjum og dreingjum síðsta kappingarár.

FSF vónar, at vit fáa eitt gott, spennandi og gevandi kappingarár í øllum deildum, har Fair Play verður sett í hásæti.




*Kappingarskipanin er nú at fáa til keyps í handlunum. Hon hevur fullfíggjað yvirlit yvir allar dystir, sum FSF skipar fyri í ár*



Í RÍKISFELAGSSKAPI SUM JAVNSETT LOND



Elin Lindenskov
Tórshavn

Jastrid Nielsen
Fámjin

Tummas Frank Joensen
Skúvoy

Artur Johansen
Strendur

JAVNAÐARFLOKKURIN

Bindiklubba-hugni
á Hotel Norð

**4. Mai kl 17.00**

verður bindiklubbahugni á Hotel Norð. Har kanst tú hyggja ella keypa spennandi vørur - aftaná er døgurði og undirhald.

**Handlarnir vera:**
- **Piff-Paff-Puff**, (barnaklæðir og barnainnbúgv)
- **Green House**, (damuklæðir)
- **Stokkrósan**, (við kurvum og taskum, av merkinum RICE)
- **Verkstaðurin á Brekku**, (við hondgjørdum tingum)
- **Afrodite, klinik og Salong** (salg og reklamatión av produktum, lætt makeup og ráðgeving)
- **Kafé**

Kl. 19.00 verður **galladøgurði** við felagssangi og undirhaldi. Kvinnikóri **Suð** syngur.

Kostnaður einans 300 kr.
Gisting á dupultkamari við galladøgurða og morgunmati einans 500 kr.

**Bilegging á tlf. 451244 & 451034 - Fax. 451245**
**Sigið frá í seinasta lagi 1 mai.**

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo



**Góðu føroyingar!**

Heitt verður á tykkum um at velja Sjálvstýrisflokkin.

Sjálvstýrisflokkurin fegnast um seinastu veljarakanningarnar, men tað er valið 30. apríl, ið er avgerandi.
Tí eiga vit í felag at taka lógvatak og fylkjast um flokkin.
Eg fari framhaldandi at leggja dent á ein politikk, har Sjálvstýrisflokkurin byggir brýr, mýkir fastlæstar støður og finnur hóvligar loysnir, sum tæna føroyska fólkinum.

Setið kross við lista D

**Við Sjálvstýriskvøðu**
**Eyðun Elttør**
**formaður**

Frá Sandoyar Sýslu Javnaðarfelag

**Hugnakvøld**

verður á Keldu í Skálavík fríggjadagin, tann 26. apríl 2002 kl. 19.00 við borðhaldi, felagssangi, harmonikuspæli og politiskum røðum.

Við vera tey lokalu valevnini umframt løgtingslimirnir Katrin Dahl Jacobsen og Kristian Magnussen.

TIltakið er ókeypis – øll javnaðaráhugaði eru vælkomin.

**Sandoyar sýslu Javnaðarfelag**

**Frá Javnaðarfeløgunum í Suðuroy**

Opið hús verður í Fjallbrúður í Vági eftir flaggdagshaldið umleið kl. 16.00. Valevnini verða at hitta.

Øll eru vælkomin.

**Javnaðarfeløgini í Suðaroy**

Brúktur Fiat Scudo
Sær út sum nýggjur




Fiat Scudo 1.9 Turbo diesel
Árg. sept. 97 Km. 37.800 Kr. 118.000,- + MVG
útgjald 31.000,-
serv. stýring, sentr. lás, tón. rútar v.m.

Bilfríðkan
við Velbastaðvegin
Postboks 1034 - FO 110 Torshavn - Tlf 317300 - www.bilfridkan.fo

**Handilshøli í Vágsbotni**

har Føroyskt Heimavirki heldur til, er til leigu frá 15. mai.

**tlf. 317895**

**Alment orðaskifti**

um barnaansing verður í Mettustovu mikukvøldið 24.04.2002 kl. 19.30, har Elin Lindenskov og Annita á Fríðriksmørk luttaka. Aftaná orðaskifti verður aðalfundur.

**Foreldrafelagið í Tórshavn**

Sosialurin -har tað hendir